# Fiskimannafelagið verður oyðilagt

ÓLI JACOBSEN



**Nú formansskeiðið hjá Jan Højgaard í Fiskimannafelagnum nærum er farið, er lætt at gera støðuna upp**

Eg haldi meg tora at siga, at eg míni tíð bygdi fiskimannafelagið upp til at vera eitt sterkt og virt felag. Vit høvdu best hugsandi kunning til limir og fólk annars, sum skapti virðing fyri felagnum. Vit uppbygdu heimsins bestu hagtalsskipan viðvíkjandi fiskimonnum, sum skapti virðing fyri felagnum bæði innan- og uttanlands. Vit høvdu stóra ávirkan á fiskivinnupolitikkin til gagns fyri fiskimenn og samfelag. Vit høvdu ein sáttmálapolitikk, sum í dag gevur føroyskum fiskimonnum kjans við heimsins fremsta fiskiskipi.

Størsta hál, sum nakað fakfelag hevur fingið, var sjómansskatturin, sum hóast harða mótstøðu frá nógvum síðum, higartil hevur givið fiskimonnum úti við ¾ milliard krónur, sum er eitt framúr grundarlag fyri persónliga eftirlønarskipan.

**Valdur uppá at leggja flotan**

Men sum ofta er, tá nakað gongur væl, eru tað teir, sum bjóða seg til at kunna gera tað enn betri.

Hetta hendi eisini við formansvalinum fyri trimum árum síðan. So mikið var tó alment kent um hesar avbjóðarar, at tað avgjørt eingin grund var til at halda, at teir kundu gera nakað sum helst betri enn nakar sum helst annar fyri at siga tað diplomatiskt.

Jan Højgaard varð valdur við einum høvuðsboðskapi um, at hann skuldu greiða allar trupulleikar við at “leggja flotan.” Hetta gav eina greiða ábending um eitt destruktivan (oyðileggjandi) hugsunnarhátt, sum neyvan boðaði frá góðum.

Hetta kom eisini skjótt at standa sína roynd. Fyrst hann fekk møguleika fyri tí, var Jan Højgaard so grammur at leggja flotan, at hann leyp semingsstovnin um aftaná kaotiskar samráðingar.

Flotin lá 2-3 vikur, uttan at fiskimenn fingu eitt oyra meira burtur úr, enn tað sum var í boði undan verkfallinum.

Hesum lærdi Jan Højgaard ikki av. Nú skuldu henda uppskriftin roynast við Carlton. Har vóru trupulleikar, sum við vanligari mannagongd kundu verið loystir við sakarmáli og/ella samráðingum.

**Sjálvt um Jan Højgaard segði fyri Sosialinum, at nevndin í felagnum var samd um at burturvísa menninar, váttar hann nú, at málið hevur ikki verið fyri á nevndarfundi. Tað helt hann annars, men eftir, at hann nú hevði leitað í gerðarbókini, ásannar hann, at tað málið hevur ikki verið viðgjørt á nevndarfundi.' Sosialurin 6. oktober.**

Her váttar Jan Højgaard sjálvur, at hann hevur logið fyri Sosialinum, og at hann ikki veit, hvat hann sjálvur hevur gjørt í avgerandi málum. Meira ússaligt kann tað ikki vera

Hóast hetta lýsir Jan Højgaard, í hvussu er uttan at partur av nevndini visti av tí, mynstringarbann. Skilið í hesum kann lýsast við, at kravið hjá Jan Højgaard vildi merkt, at kokkurin, sum var limur í FF, skuldi fara niður í løn!

Úrslitið varð, at upprunamanningin misti stórar upphæddir í inntøkum umframt sjálvan kjansin, bert takkað skilaloysi hjá Jan Højgaard.

**Rættarbrot**

Men slíkir menn skulu altíð hava syndabukkar fyri egið dugnaloysi. Tí frættist í undanfarnu viku, at teir fiskimenn, sum fóru við Carlton, vóru útvístir úr FF, so at limir í FF ikki skuldu kunna mynstrað saman við teimum.

Brævið til hesar fiskimenn var so ússaligt, at tað kundi fyri tað verið skrivað av einum skúladrongi. Brævið við sínum 30 orðum er uttan samanhang, og tað er ikki so frægt sum dagfesting í brævinum.

Jan Højgaard hevur í hesum máli enn eina ferð sjálvur avdúkað sín førleika. Fyrst sigur hann við Sosialin, at tað var ein samd nevnd, sum stóð aftanfyri hesa avgerð.

Men longu dagin eftir mátti hann vátta fyri Sosialin, at málið als ikki hevði verið fyri á nevndarfundi! Og nú nevndarfundur hevur verið, vísir tað seg, at tað var als ikki meiriluti fyri hesum stigi, og tí er tað tikið aftur.

Tað mest avdúkandi er, at Jan Højgaard helt annars, at málið hevði verið fyri á nevndarfundi, men tá hann einki fann í gerðarbókini mátti hann bert ásanna, at tað ikki var so!!!!!!

Hetta er enn eitt av mongum dømum um, at maðurin er fullkomiliga óeftirfarandi. Hann hevur ikki so frægt at evnum, at hann dugur at síggja, at slík ósannindi verða avdúkað av teimum, hann lýgur uppá.

Verunleikin er enn verri. Hann hevur ikki so frægt sum kunnað alla nevndina um hetta mál. Brævið varð sent monnunum í juli, og ikki fyrr enn nú í oktober lesa nevndarlimir um málið í bløðunum!

**Jan Højgaard váttar, at hann einki veit**

Hetta mál er eisini ein váttan um, at Jan Højgaard veit snøgt sagt einki um tað, hann arbeiðir við. Tað kann vera nóg galið, at ein fakfelagsformaður ikki veit um grundleggjandi mannagongdir í einum fakfelag.

Sum til dømis at ein formaður ikki einsamallir kann koyra menn úr einum felag. Tað skal í minsta lagi ein nevndaravgerð til. Afturat hesum er tað rættarásett, at uttan mun til viðtøkurnar, kunnu menn ikki koyrast úr einum felag undir umstøðum sum hesum, uttan at hóttu limirnir fingu møguleika at svara fyri seg. Tí vildi henda ekslusónin undir øllum umstøðum verið ógyldig, um tað kom til rættarsak.

**Veit heldur ikki, hvat hann sjálvur ger**

Men enn meira avdúkandi er, at Jan Højgaard ikki so frægt sum veit, hvat hann sjálvur hevur verið við til. Í eini søguligari avgerð hjá felagnum má hann í gerðarbókina fyri at finna fram til, at hann hevur sagt ósatt fyri Sosialin.

Jan Højgaard hevur javnan fortreð etikkin hjá øðrum og leggur gud og hvønn mann undir at vera skálk. Men sjálvur hevur hann ongan etikk. Hann fremur brot uppá bæði skrivaðar og óskrivaðar reglur fyri felagsarbeiði júst sum tað passar honum. Hetta ger hann enntá móti sínum egnu.

Tað er ikki hent fyrr í søgu FFs, at nevndarlimir eru settir til viks, soleiðis sum Jan Højgaard javnan ger tað. Í hesum málinum tekur hann einsamallur avgerðir, sum eru upplagdar nevndaravgerðir.

Í øðrum førum leggur hann miðvíst avgerandi nevndarfundir, tá ið menn, sum ikki er samdir við honum, eru burturstaddir. Hesir fáa ikki so frægt sum fráboðan um tað, sum er “samtykt”. Hetta er so groft, at tað finst ikki orð fyri tí.

**Royndi at beina fyri Norrønu**

Hvussu destruktivur Jan Højgaard sást eisini, tá hann beinleiðis tók undir við at beina fyri størsta arbeiðsplássinum hjá sjómonnum, nevniliga Norrønu. Stóð tað til hann vórðu hansara egnu limir settir í land í næstu havn.

Hvussu lítið hann fatar av tí, sum hendir á hansara øki, sást annars tá ið FAS-lógin varð broytt við stórari skattahækking til lægstslønta sjófólkið, sum eru limir í FF. Hetta varnaðist Jan Højgaard ikki fyrr enn fleiri mánaðir seinni, tá ið polakkar umborð á Norrønu gjørdu vart við hetta! Tiskil varð einki gjørt fyri at bjarga hesum fólkum undan minkingini í teirra realløn.

**Fiskimannafelagið verður oyðilagt**

Tað er eingin ivi um, at Jan Højgaard er við at oyðileggja fiskimannafelagið. Aftaná hansara ósannindir um Carlton er felagið fullkomiliga til láturs millum fólk.

Hetta er bert nakað av tí, sum er komið alment fram. Um alt varð tikið við hevði verið greitt, at støðan í verunleikanum er nógv verri enn lýst í hesi grein!

Tað er eitt sindur sárt at síggja, hvussu tað, sum er bygt upp í ártíggir, eftir so stuttari tíð liggur í sori.

Hinvegin er tað sjálvsagt upp til fiskimenn sjálvar, hvat teir gera við sítt egna felag. Men vilja teir bjarga fiskimannafelagnum mugu teir taka seg um reiggj. Gera teir ikki tað, er tað bert ein spurningur um tíð, so er felagið farið í søguna.

PS. Fráboðanin um tað ógildaðu útvísingini úr Fiskimannafelaginum liggur framvegis á heimasíðuni

# Lønir eiga ikki at verða ásettar við lóg

HELGI ABRAHAMSEN
løgtingsmaður



**Um vit skulu hava marknaðarbúskap í Føroyum, so ber ikki til at áseta lønir við lóg**

Arbeiðsmegi er ein søluvøra líka so væl sum allar aðrar søluvørður. Arbeiðarin selur sína arbeiðsmegi til arbeiðsgevaran fyri ein avtalaðan prís. Báðir partar hava møguleika at steðga handlinum, um teir halda, at lønin annaðhvørt er ov høg ella ov lág. Hetta eru vanligar marknaðarbúskaparligar spælireglur.

Lógarásett løn er ”planbúskapur”. Tá verður ikki spurt um útboð og eftirspurning. Lógin sigur tá, hvussu høg lønin skal vera, og harvið verður tað.

Sambandsflokkurin hevur altíð havt ta støðu, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu sjálvir avtala lønirnar eftir marknaðarbúskaparligum spælireglum.

**Peningur manglar**

Á almenna arbeiðsmarknaðinum er tað Fíggjarmálaráðið, sum er keypari, meðan fakfeløgini standa fyri søluni av arbeiðsmegini.

Í løtuni er landskassin í teirri støðu, at hann hevur ikki ráð at keypa vøruna fyri avtalaða prísin, uttan so at spart verður á øðrum økjum. Tí var tað, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum vendi sær til fakfeløgini í summar við eini umbøn um at steðga avtalaða lønarvøkstrinum. Men fakfeløgini søgdu nei, og tað merkir, at landskassin má spara.

Tá so fakfeløgini fara í fjølmiðlarnar við einum skrivi, har funnist verður at landsstýrinum, tí sparingar verða gjørdar, kennir løgmaður seg provokeraðan til at svara aftur.

**Vinnarar og taparar**

Møguliga skuldu fakfeløgini ikki havt sent hatta skrivið avstað, og møguliga skuldi løgmaður ikki latið seg provokerað av fakfeløgunum. Men lat tað nú fara. Almennu lønirnar verða framvegis ásettar við sáttmálum millum partarnar, og tað haldi eg vera ta fragastu loysnina. Men hetta merkir, at almennu Føroyar noyðast at spara, fyri millum annað at hava ráð til at gjalda lønir.

Ein avleiðing av marknaðarbúskapi er nevniliga, at onkur verður vinnari meðan onkur annar verður tapari. Politiski myndugleikin valdi at halda fast við marknaðarbúskapin, og fakfeløgini valdu at halda fast í lønarvøkstrinum. Landskassin hevur stórt undirskot, so onkur má fáa rokningina.

# Annika Olsen skal møguliga hjálpa Fuglafjarðar kommunu

JOHAN HERI JOENSEN



Kappingarráðið er fyri stuttum komið við einum lemjandi kritikki av ætlaðu tunnilssøluni í Fuglafirði – hesin kritikkur vísir mær at Kappingarráðið er sína uppgávu vaksið og eigur at fáa heraklapp fyri ábyrgdarfult arbeiði.

Men endaliga avgerðin liggur hjá Anniku Olsen, landsstýriskvinnu, sum umsitur Kommunala eftirliti. Um Annika Olsen, fer at skúgva góðan moral til síðis, og í røttum fólkafloksanda fer at geva grønt ljós, at selja borgarans ognir fyri undirprís, kann bert tíðin vísa. Men satt at siga so havi eg tað meting av Anniku, at hon er ein ábyrgdarfullur polittikari – og eg vóni at mín meting gevur mær rætt, at so er.

Vit eiga eisini at hava í huganum, at selt verður niður í egnar ógegnigar lummar. (Avgerðin um at selja er fyri langari tíð síðani tikin, tað sum eftir er at gera við sjálvari søluni eru bert formalitetir).

Nei, Fuglafjarðar kommuna hevur eitt at gera, nú kassin er tómur av berum kleyvarskapi, og tað er at taka lán fyri at yvirliva. Polittiska ábyrgdarloysi kemur tá svart uppá hvítt at standa í fíggjarætlanini, og verður ikki krógvað burtur í eini panikkendari dumpingsølu.